# ÍF í báðum finalunum

**Tað gjørdust oddaliðini hjá bæði kvinnum og monnum, sum tryggjaðu sær luttøku í steypafinaluni, tá Mjølnir kappingin varð hildin í Klaksvík um vkuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Stóra Mjølnir kappingin í flogbólti varð leikt um vikuskiftið, og sum vanligt, so var luttøkan stór úr øllum landinum, tá kappast varð í ymsu deildunum.

Umframt at vera kanska best vitjaða flogbóltskappingin á árinum, so hevur Mjølnir kappingin seinastu árini verið onnur av teimum, har pláss í steypafinaluni er upp á spæl, og spenningurin um hetta var kanska eyka stórur hesaferð. Hjá bæði kvinnum og monnum var tað nevnliga soleiðis undan kappingini, at hvørki av oddaliðunum hevði tryggjað sær finalupláss í Fleyrkappingini, har fyrri finalusessurin stendur upp á spæl, og tí var spurningurin, hvørt tað fór at eydnast hjá ÍF hesaferð.

Og tað gjørdi tað. Í báðum førum var tað Mjølnir, sum var mótstøðuliðið í finaludystinum, og í báðum førum varð talan um 3-0 sigrar. Serliga hjá kvinnunum var talan um sannførandi sigur hjá Mjølnir, meðan menninir í nógv størri mun máttu stríðast fyri sínum sessi.

## Spennandi tiltak

Sum tað hevur veirð nevnt seinnu árini, so er flogbóltsfinalan í steypakappingini vorðin eitt slag av flaggskipi fyri flogbóltin, og sum skilst, so verður finalan í ár einki undantak.

Enn eru ikki smálutir lagdir til rættist, men tað er tó so, at nevndin í Flogbóltssambandinum ætlar at byggja víðari á leistin, sum er lagdur seinnu árini.

Aftur í ár verður soleiðis talan um at fáa altjóða dómara til landið at døma dystin, og sum nakað heilt nýtt, er ætlanin nú eisini, at dysturin skal varpast beinleiðis á stórskíggja í høllini, soleiðis at tað ikki er nøkur umbering fyri áskoðarar-nar, at plássið er ov lítið, og at tey tískil ikki síggja nóg væl.

Hartil sigur nevndin í FBF seg eisini arbeiða við øðrum tiltøkum kring dystin, men enn eru hesi so ikki komin endaliga upp á pláss, so tað verður so helst nakað, sum vit fara at frætta meira um seinni.

Finaludystirnir í steypakappingini verða í ár leiktir 15. februar, og verða mótstøðuliðini hjá ÍF her ávíkavist kvinnurnar hjá TB og menninir hjá SÍ.



*Kvinnurnar hjá ÍF vunnu finaluna í meistaradeildini, og tryggjaðu sær sostatt pláss í steypafinaluni, har TB verður mótstøðuliðið*



*Í næstbestu kvinnudeildini gjørdist SÍ vinnari*



*Eisini hjá monnunum gjørdist ÍF vinnari, og aftur her var Mjølnir mótstøðuliðið*



*Tað er ikki bert í meistaradeildini, at ÍF er væl við. Eisini vunnu menninir kappingina í fyrstu deild*



*Kvinnukappingina í 2. deild vann Mjølnir*



*Og klaksvíkingar vunnu eisini 2. deild hjá monnum, so okkurt steypið varð kortini verðandi eftir í Klaksvíkini*



UTTAN ÚR HEIMI

# Illveður í Evropa



*Soleiðis sá út í Norðurfraklandi um vikuskiftið. Her er áin l'Oise farin upp um áarbakkarnar og hevur lagt vegirnar í einari bygd undir í vatni*

*Mynd: Reuters*

**Kavarok, skalvalop, frost og vatnflóð kravdu meiri enn 20 mannalív í Evropa um vikuskiftið, og nógvastaðni var ruðuleiki í ferðsluni**

ILLVEÐUR
*Árni Joensen*

Í Danmark noyddist bjargingartænastan at biðja hervaldið um hjálp, so sjúkrabilar kundu koma vegin fram í tí nógva jarðrokinum sunnudagin og gjáranáttina. Nógvar flogferðir máttu avlýsast, og í Kastrup noyddust ferðafólk at geva tol, tí fleiri flogfør vóru seinkað av tí vánaliga veðrinum. Í pørtum av Jyllandi og Sælandi ráddi løgreglan fólki frá at seta seg í bilin.

Aðrastaðni í Evropa var veðrið uppaftur nógv verri. Í Italia doyðu tvey fólk í skalvalopum, og í Slovakia vórðu tveir skíðrennarar funnir deyðir undir einum skalvalopi.

Myndugleikarnir í Týsklandi siga, at har doyðu sjey fólk um vikuskiftið í vanlukkum, sum stóðust av nógvum vindi og vatnflóð. Millum annað floymdu fleiri av teimum stóru áunum upp um áarbakkarnar.

Í Russlandi hevur verið sera kalt, og í Moskva doyðu 12 fólk í kulda. Eisini í Pólandi hevur kuldin verið nógvur. Higartil í vetur eru 227 fólk deyð í kulda í Russlandi og 183 í Pólandi.

Har norðuri í Fraklandi kom nógvur kavi niður. Í Charles de Gaulle-floghavnini í París vóru flogførini nógv seinkað, og á teimum stóru motorvegunum uttan fyri høvuðsstaðin sóru 15.000 fólk føst í bilunum í tí nógva kavanum.

Í Kekkia, Týsklandi, Eysturríki, Belgia, Niðurlondum, Bretlandi og Portugal regnaði illa. Áirnar fóru upp um áarbakkarnar, og nógvir vegir og gøtur í býunum stóðu undir í vatni. Í Kekkia stúrdu myndugleikarnir fyri, at teir máttu flyta fólkið úr umleið 20 bygdum, men tað gjørdist kortini ikki neyðugt.

# Irak er fyrireikað til kríggj

**Tað sigur Saddam Hussein, forseti. Samstundis leggja amerikanarar seinastu hond á eina ætlan um, hvussu Irak skal skipast, eftir at Saddam er rikin frá**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*

Einki bendir á, at irakski forsetin, Saddam Hussein, ætlar sær at slaka fyri trýstinum úr USA. Í einari sjónvarpsrøðu sunnukvøldið ávaraði hann amerikanararnar um, at irakska fólkið er fyrireikað til kríggj.

Hann legði samstundis eftir vápnaeftirlitsmonnunum hjá ST, sum hann segði vera njósnarar.

- Ístaðin fyri at leita eftir hópoyðingarvápnum fyri at avdúka lygnirnar hjá lygnaranum hava eftirlitsmenninir áhuga fyri irakskum vísindafólkum og at spyrja arbeiðsfólk um ymiskt, sum ikki er til. Eisini royna teir at savna upplýsingar um lógligar herstøðir og lógliga hernaðarframleiðslu, segði irakski forsetin í røðuni.

Samstundis sita amerikanskir embætismenn og leggja seinastu hond á eina ætlan um, hvussu tað irakska samfelagið skal skipast, eftir at Saddam Hussein er fallin. New York Times skrivaði í gjár, at stjórnin í løtuni leitar eftir einum manni, sum skal hava ta ovastu umsitingarligu leiðsluna í Irak. Sambært embætismonnum skal maðurin ikki vera heryvirmaður, men heldur ein við umsitingarligum royndum.

New York Times sigur seg eisini hava fingið at vita, at eftir amerikansku ætlanunum skulu leiðandi irakar dragast fyri ein hernaðardómstól, meðan teir, sum hjálpa USA og tess sameindu at koyra Saddam Hussein frá, fáa grið.

Amerikanska ætlanin miðjar eisini eftir at taka ræðið á iraksku oljukeldunum, og at inntøkurnar frá oljuni skulu fíggja tað, sum tað fer at kosta at endurbyggja landið aftan á eitt kríggj.

Fleiri amerikanskir leiðarar hava fyrr nevnt, at USA ætlar at fáa útlagnar irakar at skipa eina tillagingarstjórn, men sambært New York Times er hendan ætlanin slept.

## Vil samráðast

Myndugleikarnir í Norðurkorea gjørdu um vikuskiftið greitt, at teir eru sinnaðir at samráðast við amerikansku stjórnina um at loysa ósemjuna, sum er íkomin, eftir at Norðurkorea tók sína kjarnorkuverkætlan uppaftur.

Norðurkoreanska tíðindastovan KCNA skrivaði sunnudagin, at landið er til reiðar at tosa við USA, og at stjórnin er eisini til reiðar at góðtaka eitt triðja land sum semingsmann. Bæði Suðurkorea, Japan og Russland hava boðið sær til at royna semju millum Pyongyang og Washington.

Norðurkoreanar finnast samstundis at USA. Sagt verður, at rakettverjuætlanin hjá Bush-stjórnini er eitt prógv um, at amerikanska stjórnin fyrireikar seg til at leypa á Norðurkorea.

## Arbeiðsleysir prestar

Talið á arbeiðsleysum prestum í Danmark hevur verið minkandi seinastu árini, men í fjør vendi gongdin.

Sambært arbeiðsloysistølunum vóru meiri enn sjey prosent av donsku prestunum arbeiðsleysir stutt fyri ársskiftið. Formaðurin í prestafelagnum, Peter Krogsøe, sigur, at hetta er sera álvarssamt hjá tí einstaka prestinum, tí tað vísir seg at vera trupult hjá prestlærdum at fáa annað arbeiðið.

Fyrr var rættiliga vanligt, at nógvir prestar arbeiddu sum lærarar ta fyrstu tíðina eftir lokna útbúgving, men hesi viðurskiftini eru eisini broytt.

## Óvæntaður vinnari

Í Litava vann fyrrverandi forsætisráðharrin, Rolandus Paksas, óvæntað forsetavalið, sum var sunnudagin.

Undan valinum bendu allar veljarakanningar á, at sitandi forsetin, tann 76 ára gamli Valdas Adamkus, fór at verða afturvaldur, men tá uppteljingin var liðug, hevði hann bert fingið 45,1 prosent av atkvøðunum, meðan 46 ára gamli Rolandus Paksas hevði fingið 54,9 prosent. Valið sunnudagin var annað valumfar. Í fyrra umfarinum fekk Adamkus 35 prosent av atkvøðunum og Paksas góð 19 prosent.

Valdas Adamkus, sum búði í útlegd í USA, meðan Litava var ein partur av Sovjetsamveldinum, fekk stuðul frá mið- og høgravonginum í litaviskum politikki. Rolandus Paksas er formaður í liberaldemokratiska flokkinum og hevur fyrr verið forsætisráðharri, eins og hann eitt tíðarskeið var borgarstjóri í høvuðsstaðnum Vilnius.

## Ágangur ímóti nunnum

Ein kanning, sum lærdi háskúlin í býnum St. Louis hevur gjørt, vísir, at næstan 40 prosent av teimum amerikansku nunnunum hava verið fyri kynsligum ágangi, og at tað vanliga eru prestar ella aðrar nunnur, sum gera seg inn á tær.

Tey, sum hava gjørt kanningina, hava spurt 1164 nunnur í 123 ymsum kleystrum í USA. Sambært blaðnum St. Lois Post-Dispatch varð frágreiðingin gjørd longu í 1996, men úrslitið hevur verið hildið loyniligt, tí leiðslan í katólsku kirkjuni í USA stúrdi fyri avleiðingunum, frætti almenningurin um tað.

Avdúkingin kemur katólsku kirkjuni í USA illa við. Kirkjan er frammanundan fyri hvøssum atfinningum eftir tær nógvu gølurnar um prestar, sum hava gjørt seg inn á børn og ung, og frágreiðingin um, at nunnurnar heldur ikki fáa frið, bøtir ikki um umdømið hjá kirkjuni. Tey, sum gjørdu frágreiðingina, siga, at biskupparnir tykjast ikki hava stórvegis áhuga í ágangninum ímóti nunnunum.